21. mars 2018

## Ásetan av mesta innistandandi í peningastovnunum

Fleiri atlit skulu ella kunnu takast í sambandi við áseting av mesta innistandandi.

Atlit skal í fyrsta lagi takast til viðmerkingarnar til lógina.

Viðmerkingar til lógina: *Orðingin um, at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin skal vera sum minst, merkir, at gjaldføri í peningastovnum, lánsbrævaútgevarum v.m., ið kunnu væntast at verða serliga hart raktir, um tað gongur illa í føroyska búskapinum, verður ikki meira enn neyðugt er til vanliga raksturin av landinum.*

Í øðrum lagi skal atlit takast til ymsar upplýsingar um sjálvan peningastovnin. Tann mest týðandi upplýsingin er um peningastovnurin er ein SIFI-fíggjarstovnur.

SIFI er stytting fyri Systemically Important Financial Institutions. Sum navnið sigur, so eru SIFI-fíggjarstovnar teir peningastovnar, sum verða mettir at vera so týðandi fyri peningakervið, at um teir fara á húsagang, so fer tað at føra til stóran skaða fyri samfelagið. Tað er tí sannlíkt, at statsmyndugleikarnir ikki fara at lata ein SIFI-fíggjarstovn fara á húsagang. Fyri at flyta váðan av hesum peningastovnum frá statskassanum og yvir til partaeigararnar, ásetur lógin, at hesir stovnar skulu økja eginpeningin munandi komandi árini.

Í Føroyum eru BankNordik, Betri Banki og Norðoya Sparikassi SIFI-bankar

Til at meta um mótpartsváðan av peningastovnum, sum ikki eru SIFI-peningastovnar, eru niðanfyristandandi atlit tey týdningarmestu.

1. Stødd av javna
2. Eginpeningur
3. Gjaldføri
4. Tap og avsetingar
5. Primerur rakstur
6. Diamanturin hjá fíggjareftirlitinum
7. Seinasta vitjan av fíggjareftirlitinum

Diamanturin hjá Fíggjareftirilitinum eru lyklatøl, sum siga nakað um, hvussu Fíggjareftirlitið metir mótpartsváðan í ymsum peningastovnum.

Landsbankin ger við at nýta hesi lyklatøl, minst einaferð árliga eina meting av váðanum av ymiskum peningastovnsmótpørtum.

Tvey sløg av ásetingum eru neyðugar. Ein um mesta innistandandi í einstøkum peningastovnum, og ein um mesta innistandandi í føroyskum peningastovnum tilsamans.

## Ásetingar um mesta innlán í einstøkum peningastovnum.

A. Mesta innistandandi upphædd í útlendskum SIFI-peningastovnum, við undantak av depotkonti, er 200 mió. kr. í hvørjum peningastovni.
B. Í hvørjum føroyskum peningastovni sær kunnu mestu upphæddirnar vera sum víst í talvuni niðanfyri. Fer upphæddin uppum, skal hettast fáast í rættlag innan 30 dagar.

| | | |
|---|---|---|
| BankNordik | 200 mió. kr. | SIFI |
| Eik Banki | 200 mió. kr. | SIFI |
| Norðoya Sparikassi | 40 mió. kr. | SIFI |
| Suðuroyar Sparikassi | 20 mió. kr. | ikki-SIFI |

## Áseting um mesta innistandandi í føroyskum peningastovnum tilsamans.

Harumframt er neyðugt at gera eina áseting um mesta innistandandi í føroyskum peningastovnum tilsamans. Gjaldførið broytist nógv í einstaka mánaðinum, serliga í døgum við pensjóns- og lønargjaldingum, og í døgum við skattagjaldingum. Gjaldførið broytist eisini nógv yvir árstíðirnar.

Til at taka nøkur av stóru gjaldførissveiggjunum hevur landsstýrið niðanfyrinevndu kassakredittir:

| | |
|---|---|
| Eik Banki | 130 mió. kr. |
| BankNordik | 20 mió. kr. |
| Nordea Bank | 100 mió. kr. |

Harumframt kann Landsbankin nýta repo fígging. Hetta merkir, at selja lánsbrøv, og avtala at keypa tey aftur um til dømis 14 dagar. Vanliga verður hetta nýtt til stutttíðarfígging, har upphæddin liggur millum 50 og 150 mió. kr. Hetta slagi av fígging verður brúkt 5-15 ferðir árliga.

<u>Áseting um mesta innistandandi í føroyskum peningastovnum tilsamans:</u>
Mesta innistandandi upphædd, innlán og avtalu innlán tilsamans, í øllum føroyskum peningastovnum verður ásett at vera 200 mió. kr. Fer upphæddin upp um, skal hetta fáast í rættlag innan 30 dagar.